

# Máta-sýning í SMS

**Gunnvá Patursson og Elisa Heinesen skipa fyri stórari mótasýning SMS kl. 19.30**

MÓTASÝNING
*Tíðindaskriv*

Stór mótasýning verður í SMS hóskvøldið kl. 19.30 har allir klædna handlarnir luttaka.

Handlarnir í SMS vísa fram nýggjasta nýggja til summari. Her vera bæði harra klæðir, damu klæðir og barnaklæðir, skógvar og tilhoyr, sum beltir og annað at síggja. Mótasýningin byrjar kl. 19.30. Aftaná mótasýningina hava handlarnir opið.

Elisa Heinesen vísur “spring/summar kollektión í SMS. Kollektiónin eitur Silvia.

Elisa Heinesen hevur býð í London síðani 1995 og arbeitt fyri seg sjálva síðani 2000. Elisa Heinisen hevur sítt egna studio í London. Elisa fæst við, at gera nýggjar kollektiónir. Í næsta mánaða hevur hon eina kollektión í Japan.

Talan er um klæðir til kvinnur í øllum aldri. Litirnir hesuferð eru svart, grátt, hvítt og gult við einum támi av gulli. Elisa hevur fingið inspiratión frá mammuni, sum altíð hevur gingið í svørtum, gráum og hvítum klæðum. Elisa hevur nýtt litirnar hjá mammu síni, men hevur lagt sín stíl í klæðini.

Um fólk ynskja, at fáa meira at vita meira um vøruna ella at keypa kunnu tey seta seg í samband við skrivstovuna hjá SMS.

Heimasíðan hjá Elisu Heinesen er í ger. Kundar kunnu seta seg í samband við Elisu á eheinesen@hotmail.com

# Kongaliga Ballettin vitjar í Føroyum

BALLETT
*Tíðindaskriv*

Føroyingar kunnu gleða seg til eina stórsligna uppliving, tá ið Kongaliga Ballettin fyrst í juni mánaði vitjar í Norðurlandahúsinum við bæði klassiskum og modernaðum perlum.

Fyri Kongaligu Ballettina er tað altíð okkurt heilt serligt at fara á rundferð. Ikki bert tí, at tað er ein stórur heiður at sýna sína list fyri áskoðarum, sum ikki vanliga vitja Kongaliga Teatrið. Tað er eisini okkurt heilt serstakt at fara úr teimum tryggu kørmunum á Kongens Nytorv út í heim.

Á skránni vera tvey verk, sum hava fingið bestu ummælini hetta leikárið:

10 to Hyper eftir Jorma Elo úr Finnlandi varð sera væl fagnað av ummælarunum, tá ið verkið hevði heimspremieru á heysti 2006. Verkið er ein erotisk og kraftmikil pas de deux – ein dansur fyri ein mann og eina kvinnu – í svørtum, skyggjandi búnum, við tónleiki eftir Mozart.



Hitt nýggja verkið, Dancing on the Front Porch of Heaven, varð frumsýnt í Danmark í februar 2007. Ulysses Dove, sáli, skrivaði verkið at heiðra sín góða vinmann, enska tónaskaldið Benjamin Britten, stutt eftir deyða hansara.

August de Bournonville er størsta útflutningsvøran í danskari ballett. Hansara ballettir verða framførdar um allan heim, og Føroyar og Grønland skulu sjálvandi uppliva verk eftir stóra danska koreografin. Umframt huglætta og vakra verkið Blomsterfesten i Genzano fáa áskoðararnir eisini høvi at uppliva 3. part úr Napoli.

# Almanna- og heilsurøktarafelagið havt aðalfund

FAKFELAG

Tíðindaskriv

Almanna- og heilsurøktarafelagið hevði aðalfund mikudagin 18. apríl 2007. Majbritt Mohr stóð ikki fyri vali í ár, so hon heldur fram sum forkvinna. Hinvegin stóðu tveir nevndarlimir og ein tiltakslimur fyri vali. Anna-Britt Eið og Jóhanna Køtlum stillaðu uppaftur, og tær vórðu afturvaldar. Eisini Katrin Biskopstøð stillaði uppaftur, og hon varð afturvald til tiltakslim. Umframt omanfyri nevndu limir eru Sunrid Berg og Eyðna Hansen eisini nevndarlimir, og Eimy Hansen er tiltakslimur.

Lis Eklund í Niðristovu, forkvinna í Javna, hevði eina áhugaverda framløgu. Hon tosaði millum annað um tørvin á røktarstarvsfólki á sambýlunum til fólk við breki. Lis legði dent á, at Javni var eitt áhugafelag, og at felagið als ikki vildi taka dagar ímillum, hvørji starvsfólk skulu arbeiða á sambýlum ella bústovnum. Javni er áhugaður í, at búfólkini millum mangt annað fáa góða røkt, og at heilivágsumsitingin hjá teimum er fullgóð.

Í sambandi við framløguna hjá Lis vístu vit í Almanna- og heilsurøktarafelagnum á førleikarnar hjá heilsurøktarunum. Eitt nú greiddu vit frá, at vit hildu okkum vera ein starvsfólkabólk, ið hevði kunnað loyst nógvar av teimum uppgávunum, ið eru í heimum fyri fólk við breki.

# Mini-cruise til Íslands

FERÐING

Smyril Line bjóðar í apríl mánaði fólki at fara á eina cruiseferð til Íslands fyri lítið og lætt. Tað ber til at sleppa avstað fyri niður í 200 krónur fyri hvønn. Smyril Line greiðir soleiðis frá ferðini til Íslands:

Sigið gerandisdegnum farvæl og njótið eitt frálíkt minicruise við Norrønu til Íslands og aftur. Slappið av á túrinum, njótið friðin, góða matin og tey góðu taxfree tilboðini. Vit liggja í hálvanannan dag í Seyðisfirði, har høvið verður at fara í land og taka egnan bil við og koyra hagar einum lystir. Síggið víddirnar, stórfingna mánalandslagið og baðið í heitum keldum. Búgvið umborð á Norrönu meðan vit steðga í Seyðisfirði.

# Hoyr AME – Reykjavík á alnetinum

**Herfyri spældu nøkur av fremstu føroysku tónleikanøvnunum í Reykjavík, í sambandi við Atlantic Music Event í spælistaðnum NASA, nú kann konsertin upplivast á alnetinum**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Størsta íslendska útvarpsrásin Rás 2 var við, tá Atlantic Music Event vitjaði íslendska høvuðsstaðin. Útvarpsstøðin bandaði konsertirnar við Brandi Enni, Teitur, Eivør, Høgna Lisberg og Gestum.

Langa fríggjadag varð konsertin send á íslendsku Rás 2 í sending, ið varaði yvir 2 tímar. Á heimasíðuni hjá Rás 2 ber nú til at hoyra upptøkurnar í fullari longd. Her er høvi at hoyra nýggj løg við eitt nú Teiti, Eivør, Høgna Lisberg og Brandi Enni. Millum løgini er frálíka Grát Ei, ið Eivør vann sangskrivarakappingina hjá Atlantic Music Event við og lagið Tú ert ein eingil av komandi føroysku útgávuni hjá Teiti.

Hoyr konsertina á netinum: *dagskra.ruv.is/streaming/ras2/?file=4347462*

## Almanna- og heilsurøktarafelagið havt aðalfund

FAKFELAG
*Tíðindaskriv*

Almanna- og heilsurøktarafelagið hevði aðalfund mikudagin 18. apríl 2007. Majbritt Mohr stóð ikki fyri vali í ár, so hon heldur fram sum forkvinna. Hinvegin stóðu tveir nevndarlimir og ein tiltakslimur fyri vali. Anna-Britt Eið og Jóhanna Køtlum stillaðu uppaftur, og tær vórðu afturvaldar. Eisini Katrin Biskopstøð stillaði uppaftur, og hon varð afturvald til tiltakslim. Umframt omanfyri nevndu limir eru Sunrid Berg og Eyðna Hansen eisini nevndarlimir, og Eimy Hansen er tiltakslimur.

Lis Eklund í Niðristovu, forkvinna í Javna, hevði eina áhugaverda framløgu. Hon tosaði millum annað um tørvin á røktarstarvsfólki á sambýlunum til fólk við breki. Lis legði dent á, at Javni var eitt áhugafelag, og at felagið als ikki vildi taka dagar ímillum, hvørji starvsfólk skulu arbeiða á sambýlum ella bústovnum. Javni er áhugaður í, at búfólkini millum mangt annað fáa góða røkt, og at heilivágsumsitingin hjá teimum er fullgóð.

Í sambandi við framløguna hjá Lis vístu vit í Almanna- og heilsurøktarafelagnum á førleikarnar hjá heilsurøktarunum. Eitt nú greiddu vit frá, at vit hildu okkum vera ein starvsfólkabólk, ið hevði kunnað loyst nógvar av teimum uppgávunum, ið eru í heimum fyri fólk við breki.